Árliga útferðin

Mánadagin 22. juni 2015 fer skúlin árligu útferðina.

Um veðrið verður til vildar, ætla vit í ár, at felags gongutúrurin byrjar á Norðasta Horni. Vit ganga eftir rossagøtuni út til fjósini í Havnardali og niðan á Vesturvarða, har útsýnið er frítt oman yvir býin og út á hav.

Frá Vesturvarða verður farið eftir fjallagøtuni niðan á Kleynsvarða, har vit hvíla okkum eina løtu. Haðanífrá ganga vit víðari til Longutjørn og halda leiðina fram til drekkivatnsbrunnin í Villingadali, og ganga síðani heim í skúlan.

Vit møta við bussteðgiplássið úti á Norðasta Horni í seinasta lagi kl. 8.30.

Fyri at avmarka ferðsluna og koyringina út í Havnardal, er ein
møguleiki at samskipa bilaflutningin. Foreldur ella grannar kunnu t.d. avtala sínámillum at fylla ein bil heldur enn at fara við einum barni í hvørjum bili. Til ber sjálvandi eisini at brúka bussleiðina.

Hetta er ein lættur gongutúrur. Veðurforsøgnin fyri mánadagin sær hampiliga gott út, men havið heit og góð gonguklæðir, ein góðan matpakka og okkurt at drekka við á túrin.

Skúladagurin hjá teimum eldru næmingunum endar, tá vit koma aftur á Løgmannabreyt. Rokni við, at tað verður um middagsleitið. Næmingarnir í 1. og 2. fl. fara í frítíðarskúla.